# Jólahugnin kann geva búkinum yvirarbeiði

Tá vit hugsa um alt tað vit borðreiða við til jóla, kann ikki sigast annað, enn tað er nakað av einari kolesterol- og kaloriuveitslu, vit bjóða okkum sjálvum. Men hvat gera vit so, við tørvin á vitaminum, mineralum og kosttrevjum?

Til jóla mugu vit sleppa at forkela okkum sjálvi, hugsa vit hvørja ferð vit koyra okkurt søtt ella feitt í munnin til jóla. Kroppurin er ikki vanur við at vit gera hetta og kann hetta føra til at vit hava ikki líka nógva orku sum vit plaga.

### Tað góða gamla grønmeti

Okkum nýtist ikki heilt at gloyma grønmeti til jólamatin. Tað er jú nógv uppi í tíðini at eta ovnbaka grønmeti t.d. persillurót, pastinak, reyðrøtur, røtur o.a. hetta sær vakurt úr til jóladøguran og er samstundis ein rík kelda av vitaminum og kosttrevjum. Leita á netinum eftir uppskriftum, sum kunnu geva tær íblástur til okkurt annarleiðis.



### Ov nógv av tí góða?

Um tú hevur eti ov nógv av tí tú vanliga ikki etur og búkurin er farin í baklás, ja, so eru ymisk ráð til at takað. Hevur tú fingi forstoppilsi, ov nógva magasýru, ella okkurt heilt annað, ert tú altíð vælkomin á apoteki at spyrja teg fyri.

*kelda: www.apotek.fo*

















